

*Útróðrarbátur kemur at borði*

## Váti føðingardagurin hjá Sivar

Tá kundi verða prátað um okkurt, sum var hent á túrinum sum til dømis 61 ára føðingardagin hjá Sivar, sum var 21. juli.

Eingin visti nakað. Sivar fór sum vanligt til útróðrar saman við Mortan og Lundsbjerg. Teir báðir ánaðu heldur einki, fyrr enn teir sigldu framvið einum portugisara. Nú vildi Sivar hava eina fløsku av reyðvíni í samband við dagin. Hana fingu teir fyri einar vøttur.

Teir fingu skjótt uppí bátin, og tá lagt varð at borði aftur, var fløskan tóm. Hetta var ov mikið fyri Sivar. Hann var hálvfullur og mátti hjálpast upp á dekkið. Hinir báðir tømdu skjótt bátin í góðum lag.

Hesa søgu varð nógv flent at, og tað varð eisini lagt væl omaná søguna. Tann eina fløskan gjørdist til tvær fløskur. Tað var eisini orsakað av sterka sólarhitanum tann dagin, at teir vóru komnir at kenna so nógv til.

Hetta dámdi Justinesi púra einki, og hann hevði eisini givið greið boð um at halda okkum langt frá portugisarunum, so slíkt ikki skuldi endurtaka seg.

Justines kundi eisini stuttleika sær saman við okkum. Mourentius varð eisini glósaður fyri sína miseydnaðu roynd at velta eplir í Grønlandi.

Hann glósaði aftur, og hjá monnum sum høvdu livað so tætt saman í so langa tíð, var láturin bestu háttur at fáa alt at rigga.

Eisini var nógv tosað um útimøtið, sum greitt er frá. Tað, sum menn mintust best, var tær ákoyringar, sum drekkiskapurin fekk av talarunum.

Sunnudagsmøtini umborð vardu vanliga eina tíma. Tað vóru vanliga 2-3 talarar hvørja ferð umframt skiparan. Tveir teirra hoyrdu til brøðrasamkomuna. Fjórði maður var Jacob Gaard.

Í samband við hesi sunnudagsmøti komu menn ofta at trætast um læruna hjá baptistunum, serliga í samband við dópin. Skiparanum dámdi illa, at slík møti skuldi enda við "slíkum svassi", sum hann tók til.

Fyri ungdómin var hetta mest undirhald. Hann tók ikki hesar spurningar so tungt.

Síðan var eisini tosað um tað, sum var hent undir fiskarínum á Stóra Hellufiskabanka. Tað var ein sportur at lyfta 50-pundstoskar leysar í luftini. Tummil og lítlifingur varð stungin inn í eyguni, og so skuldi lyftast við einari hond. Tað vóru bert tveir mans, sum kláraðu at lyfta 60-pundstoskar á hendan hátt. Hetta vóru Mortan og Lundsbjerg.

Tað var eisini spennandi at fáa teir stóru lirarnar, eitt slag av steinbíti, og kongafisk á húkarnar. Hesir fiskar smakkaðu væl, hóast teir ikki vóru vakrir.

Orsøkin, at vit vóru so grammir eftir hesum fiskasløgum, var teirra serligi eginleiki sum saltmatur til heimanýtslu.

Men kalvi og svartkalvi var ikki saltaður. Vit ótu kalva dag og nátt, men svartkalvan løgdu vit einki í.

## Toskarhøvdaveitsla

Her skal komast aftur til kostin teir fyrstu sjey dagarnar á heimreisuni. Kosturin var toskarhøvd og hørð skipskeks. Teir seinastu dagarnar vit fiskaðu varð stóri fiskakassin miðskips fyltur við toskahøvdum. Her varð ikki spart, tá ið etið varð. Tað vóru tvey stór toskarhøvd til hvønn mann til døgurða, og tað sama til náttarmatin. Hetta var matur, sum varð lættur at gera til. Kjálkarnir vóru skornir, og skrokkurin fór til havs. Hetta kundi tykjast at vera spill av mati, men grýturnar kundu ikki taka so nógv heil toskarhøvd, sum skuldu til ein døgurða.

Hetta var so etið við nógvum feitti og sinoppi, og ikki fór nakar svangur frá borðinum. Og so var tosað og reypað!

Soleiðis gingu tey fýra fyrstu samdøgrini. Veðrið var 6-7 vindstig av landsynningi, men fimta dagin vísti barometrið storm. Tað gjørdist eisinu meira ófriðarligt í sjónum.

Longu á kvøldi var hann norðan við stormi og kavaheglingi. Á midnátt vóru báðar vaktirnar uppi fyri at repa seglini.

Hetta gjørdist ein ófriðarlig nátt, men út á fyrrapartin fór barometrið at kvinka upp eftir. Báðar vaktirnar vóru uppi alla náttina fult ílætnar, klárar at tørna til, um nakað hendi. Hesa náttina máttu vit sleppa kjálkunum.

## Farvæl til Grønland

Hesa buldrutu náttina fóru vit framvið Kappanum. Út á seinnapartin linkaði vindurin, so vit kundu ganga á dekkinum. Nú fekk kokkurin aftur mót til at seta grýtuna við kjálkum á komfýrin. Tá vóru tað 24 tímar síðan, vit fingu okkara høvuðsrætt, ella "hovedret", sum Lundsbjerg segði tað.

At toskarhøvdnini ikki vóru farin í havið hevði sína serligu frágreiðing. Tá ið vit repaðu seglini, blakaðu vit seinastu høvdini upp í bjargingarbátin. Hetta sigur eisini nakað um hugburðin til trygd umborð á skipunum. Tann ikki tildekkaði bjargingarbáturin var javnan nýttur sum eitt lossipláss fyri øllum møguligum óruddi.

Tann sætta dagin fingu vit ein sjógv, sum gjørdi, at skipið fekk slagsíðu. Kortini varð siglt 7 míl bert við seglum. At sigla við slagsíðu var sera strævið, og tað var eisini strævið at liggja í koyggjuni.

Men vit vóru so á veg heim. Hetta var ein góður uggi.

Nú vóru so heldur ikki nakrir kjálkar eftir, men vit høvdu tá eisini etið 588 toskarhøvd. Men nú skuldi sparast og skamtast. Nú fingu vit ein ávísa skamtan av skipskeks eina ferð um samdøgrið. Te og sukur varð innilæst í proviantrúminum. Kaffi og margarin var longu uppi 10. dagin á heimreisuni.



*Føroya løgting bygdi hetta sjúkrahús í Føroyingahavnini í 1936*

## Gravplássið

Eina ferð vit vóru inni undir landi í ringum veðri, fóru vit eina útferð við báðum bátunum. Vit høvdu kumpass við, um tað skuldi blivið toka. Vit fóru ikki so langt, tí skiparin hevði givið boð um, at vit skuldu ikki vera meira enn 3-4 tímar burtur. Hetta var eitt framúr upplivilsi at rógva frá oyggj til oyggj. Her var nógvur fuglur, men ikki eitt menniskja.

Eina ferð síggja vit nakað, sum minnir um ein varða, og hetta skuldi sjálvsagt kannast. Tá vísti tað seg, at hetta var eitt gamalt gravpláss. Her vóru beinagrindir og skøltar í hópatali. Vit løgdu sjálvsagt alt aftur, og fóru so umborð aftur. Vit høvdu ikki hug at síggja meira hendan dagin.

Hetta var eisini nakað, sum vit hugsaðu nógv um. Tá ið vit hesi myrku oktoberkvøld royndu at ímynda okkum liviháttin hjá hesum heidnu eskimoum, rann tað okkum kalt niður eftir bakinum.

Ferðin heim vardi 14 dagar. Fyri meg sjálvan var tað ein stórhending at fara til Grønlands og at fylla 18 ár.

Avrokningin fyri árið var kr. 1.200 krónur. Hetta vóru nógvir pengar fyri ein stakan, men ikki nógv fyri ein familjumann. Fiskaprísirnir vóru lágir.

4.mars 1930 fór eg aftur við Silver Lining. Hesa ferð á Suðurlandið.



*Sama ár varð sjómansheim bygt*

## Gott íkanst

Tað var heppið, at vit fingu hetta íkast til søguna um okkara grønlandsfiskiskap. Her kann verða skoytt uppí, at meðan nógvar føroyskar manningar eru farnar undir Íslandi, so er neyvan nakað dømi um, at nøkur manning er farin undir Grønlandi, hóast tað farvatnið var roknað sum munandi meira vandamikið.

**Komandi partur**

Í komandi pørtum fer Harald at greiða frá, tá hann í 1932 fór við Arizonu, og teir sigldu á land í Íslandi í sama illveðrinum, sum beindi fyri Lauru og Immanuel. Teir komu væl burtur úr tí, men hart var tað.

Sosialurin